Tróndur og Sigmundur semjast



Tróndur og Sigmundur semjast

Hyggið at mynd av Tinganesi

Nú var bara Tróndur í Gøtu eftir. Sigmundur og Tróndur avtalaðu at møtast á tingstaðnum í Havn. Teir royndu at semjast, men illa bar til. Endin varð, at teir avtalaðu, at báðir skuldu fara til Hákun jals um summarið, og so skuldi Hákun jallur døma í ósemjuni teirra millum.

Sigmundur fór avstað og møtti jallinum, men Tróndur kom ikki til Noregs. Skipið hjá Tróndi rak hvørja ferð aftur til Føroya. Hákun jallur gjørdi av, at Tróndur skuldi gjalda fýra bøtur. Eina bót fekk hann fyri at hava dripið Brest, eina fyri at drepa Beinir, eina fyri at hava ætlað at dripið Sigmund og Tór og eina fyri at selja teir.

Hákun jallur gjørdi eisini av, at Sigmundur skuldi eiga helvtina av landinum, og at hann sjálvur skuldi hava hina helvtina. Sigmundur fór aftur til Føroya við hesum boðunum. Tróndur og Sigmundur møttust aftur á tinginum í Havn, og har góðtók Tróndur boðini frá jallinum.

Spurningar

1) Hvar man hetta vera?
2) Hvørjir munnu persónarnir vera?
3) Nær man hetta vera?